Tangz í Vesturkirkjuni

Frá Vilhelm Magnussen og Kingo til Dánjal á Neystabø og Tangz. So vítt fevndi tónleikakvøldi›, sum Føroya Studentaskúli skipa›i fyri í Vesturkirkjuni mikukvøldi› í sambandi vi› 1000 ára haldi›

UMMÆLI
John Johannessen

Eitt, men ikki endiliga eins.

Solei›is tók Heri Joensen, sóknarprestur, saman um sang- og tónleikakvøldi›, sum Føroya Studentaskúli og HF skei› skipa›i fyri í Vesturkirkjuni mikukvøldi›.

Næmingarnir og lærarar teirra høvdu stápla› eitt megnar tiltak á beinini, sum gav eina gó›a mynd av sanginum og tónleikinum í føroyska trúarlívinum heilt frá Kingo og fram til í dag. Tey, sum framførdu, vóru úr ymsum samkomum í landinum, og umbo›a›i tiltaki› tí eisini alla breiddina í føroyska trúarlívinum.

Kingo úr Tjørnuvík

Eftir at Bergur Debes Joensen, sóknarprestur, hev›i bo›i› vælkomin og røtt eitt sindur um t‡dingin av at vera kristin, var› lagt til brots í fjølbroyttu tónleikaskránni.

Ta› vóru kirkjufólk úr Tjørnuvík, sum løgdu fyri vi› at syngja Kingo sálmar, júst sum teir vór›u sungnir í Tjørnuvík fyri hundra› árum sí›ani. Gamli Vilhelm Magnussen úr Tjørnuvík, sum sjálvur hevur uppliva› Kingo sangin sum barn, sang meistarliga fyri.

Tjørnuvíkingarnir løgdu stóran dent á, at sygja júst sálmarnar á donskum og drynjandi, júst sum gjørt var› í føroysku kirkjunum, á›renn ta› gjørdist vanligt at spæla urgu aftur vi› sanginum.

Heilt vist var hesin forni sangur hugtakandi at hoyra framførdan í teirri n‡mótans og glæsiligu Vesturkirkjuni.

Enskur íblástur

Frá Kingokórinum leyp skráin rættuliga langt fram í tí›ina til sálmasang frá brø›rasamkomuni.

Sálmarnir vi› enskum íblástri, sum Siloakóri› úr Fuglafir›i vi› Ey›un á Lakjuni framførdi, vóru ógvuliga melodiøsir og góvu okkum áhoyrarum eitt gott innlit í vakra kórsangin, sum ey›kennir brø›rasamkomuna.

Siloakóri› leg›i stillisliga fyri vi› men enda›i vi› einum lagatyssi, sum rættuliga setti lív í tey 800 átrúna›arliga fjølbroyttu fólkini, sum vóru komin saman í Vesturkirkjuni mikukvøldi›.

18 ára gamli Gunnar Guttesen tók vi›, har Siloakóri› slepti. Hann framførdi meistarliga saman vi› vinmonnum sínum eitt instrumentalt lag, sum hann sjálvur hev›i gjørt.

Gunnar Guttesen og vinfólk framførdu eisini eitt ógvuliga vælljó›andi norskt lag, sum kallast Let the sunshine.

Kristiligur ungdómur

Kristiligi felagsskapurin fyri studentar í Føroyum, KFS, setti eisini sín dám á kvøldi› vi› vøkrum lovsangi, og eftir tey tók ein bólkur, sum kallar seg Saltbrø›ur vi›.

Saltbrø›ur framførdu ógvuliga n‡tmótans tónleik vi› kristiligum innihaldi.

Ein annar bólkur, sum heilt avgjørt lá longst frá Kingo sanginum, var bólkurin Liquid Gravity. Hesin bólkurin spældi alternativan rokk, og hóast ikki eitt or› var› nevnt í tekstinum um kristindóm, hev›i enski teksturin, sum Dánjal Jacobsen hev›i skriva›, ein heilt grei›an bo›skap.

Aftur til Kingo

Í endanum á skránni sluppu næmingarnir í Hoydølum sjálvir fram at mikrofonunum. Næminagarnir, sum ganga á hástigi í tónleiki, høvdu skipa› seg í eitt kór, sum undir lei›slu av Zazhariasi Sørensen framførdi kingo tónleik eftir moderna›ari útseting.

Ógvuliga stórsligi› ljó›a›i ta›, tá næmingarnir sungu sálmin, Nú rennur sólin frí, efir útseting hjá Kára Bæk.

Rythmiska kóri› í Hoydølum slapp eisini framat, og framførdu tey vi› undirspæli frá popbólkinum, Tangz, bort úr Eversmiling Liberty.

Sanniliga eitt framúr væl eydna› tiltak, sum tók ta› gle›iliga fram í krisnitrúnni og savna›i ymsu meinigheitirnar heldur enn at spja›a, sum føroyingar ofta hava lyndi til.

Eingin ivi um, at slík tiltøk hoyra heima í almennu føroysku kirkjunum, eins og vanliga gu›stænastan.

Eitt, men ikki endiliga eins…

VI‹MERKINGAR

Spurningar til:

Ey›un Elltør, Karsten Hansen og Jógvan vi› Keldu

Vilhelm Johannesen, løgtingsma›ur

Jógvan vi› Keldu er í samgongu. Er sostatt ein av teimum, sum hevur tiki› sær ábyrgdina av at st‡ra landinum, og skuldi tí havt munandi størri ábyrgd og meira um oyruni enn eg havi.

Í samband vi› uppstillingina til b‡rá›svali› í Klaksvíkar kommunu 21. november í ár, fekk undirrita›i áheitan um at stilla upp á lista javnarfloksins til b‡rá›svali›, men av tí at eg siti sum løgtingsma›ur bar eg meg undan. Mín grundgeving var, at ta› ber ikki til, at vera løgtingsma›ur og b‡rá›slimur samstundis.

Nú valevnislistarnir er kunngjørdir, eri eg vor›in varur vi›, at tveir landsst‡rismenn hava lati seg stilla upp til b‡rá›svali› í Klaksvíkar kommunu. Teir eru Ey›un Eltør, i› er á sjálvst‡rislistanum og Karsten Hansen, sum er á tjó›veldislistanum. Hesin seinni hevur beinlei›is bo›a› frá, at hann ætlar sær eftir borgmeistarakeutuni, og ta› vil siga, at hann leggur frá sær sum landsst‡risma›ur.

Mín spurningur til landsst‡rismenninar Ey›un Eltør og Karsten Hansen er: Ver›a tit valdir í b‡rá›i›, og kortini ikki røkka eftir ketuni, fara tit so at halda fram sum landsst‡rismenn, ella fara tit at siga landsst‡rissessirnar frá tykkum, og at taka vi› sum b‡rá›slimir? Um svari› frá tykkum er noktandi, er tykkara uppstilling uppá kvamsvís, t.v.s. at tit vi› tykkara uppstilling bert gera gjøldur burtur úr veljarunum og halda veljaran fyri ta› turra spott. Tit vita bá›ir tveir, at ein landsst‡risma›ur kann ikki hava onnur størv, og kann tí heldur ikki sita sum b‡rá›slimur.

Mín spurningur til Jógvan vi› Keldu er: Um tú ver›ur valdur og megnar ar var›veita ketuna, ætlar tú so framhaldandi at vera bæ›i løgtingsma›ur og b‡rá›sforma›ur í Klaksvíkar kommunu. Sjálvur meti eg løgtingsarbei›i› at vera so krevjandi, og at taka so nógva tí›, at eg ikki sá meg føran fyri ar siga ja til eina áheitan um at stilla upp til b‡rá›svali›. Á tingi eri eg andstø›utingma›ur.

Eg skal n‡ta høvi› at heita á allar veljarar í Klaksvíkar kommunu, um at fara mannsterkir á val og seta krossin vi› lista C ella eitt av valevnunum á lista javna›arfloksins. Javnarflokkurin hevur fleiri fer›ir fyrr havt lei›sluna í Klaksvíkar kommunu. Vit høvdu kommunust‡risformenninar Jacob E. Jacobsen (Jakke á Bakkanum), Richard Jacobsen og Poul Jacob Olsen. Vit hava eisini havt tveir b‡rá›sformenn. Nevniliga Trúgva Laksáfoss og Óla Heinesen. Nu er vert at royna javna›arflokkin aftur. At geva honum lei›sluna av b‡num!

Í teimum tí›arskei›um, tá javna›arflokkurin hev›i lei›sluna, hendu framstig í Klaksvíkar kommunu. Stórar havnaútbyggingar á vestursí›uni, á Stongunum og á Kósini. Bátabrúgvarnar vór›u lagdar út. Svimjihøllin var› bygd, vit fingu tí›arhóskandi hølir til eitt bókasavn, stø›i› var› lagt undir vi›alundina úti í Grøv. Fari› var› undir at frí›ka runt um í b‡num. Byggisamtykt og byggiætlan var› gjørd fyri alla kommuna. Stór lendir vór›u keypt og løgd út til sethúsabygging o.s.fr.

Og javna›arflokkurin í Klaksvík eigur framvegis fólk, i› hava evnir og vilja, og sum hava s‡nt dugnaskap á kommunalpolitiska økinum. Tí skal eg enda vi› at endurgeva áheitanina um at fara mannsterk á val og seta krossin vi› lista C ella eitt av valevnunum á lista javnarfloksins til b‡rá›svali› 21. november. Gott val øll somul!

Revsa›ir fyri at seta virki á stovn í Vági

– Tey 25 arbei›splássini á Palm Seafood í Vági ver›a ikki til um nøkur ár, tí eitt virki í Vági hevur nógv fleiri útrei›slur, enn virkini í meginøkinum hava, siga Leivur Lindenskov og Petur Johannesen

KAPPINGARFØRI
Áki Bertholdsen

– Ætlar ta› almenna at avtofta vinnulívi› í útja›aranum í Føroyum og noy›a øll virkini at flyta til Havnar?

Hetta er spurningurin, sum lei›slan á saltfiskavirkinum, Palm Seafood, í Vági nú seta almennu myndugleikunum. Og teir siga, at teir vilja fegnir hava svar frá Anfinni Kallsberg, Løgmanni, Høgna Hoydal, Varaløgmanni og Helenu Dam á Neystabø, fyri at fáa svar frá einum politikara úr hvørjum flokki í samgonguni.

Og ta› er ikki av ongum, at Leivur Lindenskov og Petur Johannesen, sum eru oddamenn í Palm Seafood í Vági, reisa hendan spurningin.

Teir siga, at ta› eru eini 25 ársverk á hesum saltfiskavirkinum, sum teir hava í Vági, og teir keypa eini 2.500 tons av fiski um ári›, sum teir sí›ani virka.

– Men hesi arbei›splássini eru øll burtur um nøkur ár. Orsøkin til ta› er, at ta› stendst so nógvur eyka kostna›ur av at hava saltfiskavirki í Vági, at vit koma ikki at standa okkum í kappingini vi› virkini í mi›sta›arøkinum, sum ikki hava hesar somu útrei›slurnar.

Teir siga, at ta› allarmesta av fiskinum, sum teir salta, noy›ast teir at keypa nor›anfyri og flyta hann su›ur,tí ongir bátar eru eftir á fjør›inum. Og sí›ani skulu kassar og kør flytast nor›ur um fjør› aftur.

Teir siga, at ta› kostar teimum minst 600.000 meiri at hava virki› í Vági, enn ta› hev›i kosta› at havt eitt tilsvarandi virki í mi›sta›arøkinum.

Av teimum 2.500 tonsunum, sum teir virka um ári›, keypa teir umlei› 300 tons í Vági og 200 tons a›rasta›ni í Su›uroy

Av teimum 2.000 tonsunum av fiski, sum teir sostatt keypa nor›anfjør›, eru eykaútrei›slurnar hesar hjá virkinum í Vági:Flutningur av fiski til virki›: 2000 tons á 20 oyru fyri kilo = 400.000,00 kr.
1250 kør retur á 25 kr. hvørt = 31.250,00 kr.
23.810 av 70 L. kassum retur á 3,13 kr. fyri hvønn = 74.525,30 kr.
10.000 av 90 L. kassum retur á 3,13 kr. fyri hvønn = 31.300, 00 kr.

Sostatt kostar flutningurin av fiskinum til virki og flutningurin av íløtum retur tilsamans 537.075,30 krónur tilsamans.

Tann virka›i saltfiskurin ver›ur fluttur av aftur virkinum í 40 fót bingjum. Sambært Eimskip er meirkostna›urin hjá Palm Seafood av hesum 70.500, 00 krónur.

Sostatt eru eykaútrei›slurnar av at hava virki› í Vági, ísta›in fyri í mi›sta›arøkinum, tilsamans 607.575,30 krónur, vi› mvg.

Teir bá›ir á Palm Seafood siga, at í hesum roknistykkinum hava teir ikki tiki› kostna›in av at flyta fisk, sum teir keypa a›rasta›ni í Su›uroynni, til Vágs. Prísurin fyri ta› er 12 oyru fyri kilo vi› Strandfer›sluni.

Teir hava heldur ikki tiki› a›rar útrei›slur vi›, sum teir hava av at vera í Vági, men sum virkini í mi›sta›arøkinum ikki hava. Eitt nú er ta› d‡rari hjá teimum at fáa pakning til vega. Og ikki minst kostar ta› meiri hjá einum virki í Vági at fáa salt til vega, enn ta› kostar hjá einum virki í mi›sta›arøkinum, tí farmagjald skal betalast til Vágs. Og ta› er ein stór útrei›sla, tí ey›vita› brúkar eitt saltfiskavirki nógv salt.

Gera mun á virkjum

Teir bá›ir vinnulívsmenninir í Vági vísa eisini á, at ta› almenna letur stu›ul til at flutning av fiski.

– Men ta› eru bara feskfiskavirkini, sum fáa hendan stu›ulin fyri at flyta tann virka›a fiskin til Havnar. Stu›ulin er 25 oyru fyri kilo. Saltfiskavirkini fáa ikki eitt oyra í stu›uli til at flyta saltfisk til Havnar.

– Øll virkini í landinum kappast um ta› somu rávøruna. Men ta› gevur onga meining, at vit, sum salta fiskin, skulu vera fyri vanb‡ti afturímóti teimum, sum virka feskan fisk.

Leivur Lindenskov og Petur Johannesen spyrja, um ta› er so spinnandi gali› í Føroyum, at landsins kosnu menn og kvinnur eru komnir til ta ni›urstø›u, at ta› eru tey, sum skulu gera av, hvar í landinum fiskivinnan skal vera??

– Ta› er júst ta›, tey gera vi› at gera mun á, hvørji virki skulu fáa stu›ul og hvørji skulu ikki fáa stu›ul. Teir siga, at teir hava veri› á fundi í vinnunevndini, har teir hava greitt frá stø›uni.

– Men í vinnunevndini er uttan iva ein avger› tikin um, at í Su›uroynni skal onki saltfiskavirki vera. - Tí ver›ur almennur stu›ul bara latin til feskfiskavirkini. Og sostatt stu›la politikararnir uppundir tann ójavna, sum longu er ímillum virkini, siga Petur Johannesen og Leivur Lindenskov.



Er ta› so spinnandi gali›, at landsins kosnu menn og kvinnur hava tiki› avger› um, at í Su›uroynni skal onki saltfiskavirki ver›a, spyr lei›slan á Palm Seafood í Vági. Teir vóna at fáa svar frá hesum trimum, sum manna lei›sluna í flokkunum í samgonguni, og sumsostatt eru fremstu umbo› fyri landsins stjórn